# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Eli Danielsen, ættaður úr Sørvági, búsitandi í Tórshavn**, andaðist fríggjadagin á Landssjúkrahúsinum, 77 ára gamal. Jarðarferðin verður týsdagin kl. 13 úr Vesturkirkjuni. Tey, ið vilja minnast Eli, kunnu lata hjartafelagnum eina gávu, konta í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at elskaða mamma okkara, vermamma, omma
og langomma

**Alma Rasmina Svenhilda Hammer**
født Djurhuus
Hvalba
ættað úr Sumba,

andaðist á Surðoyoyar Sjúkrahúsið
mánadagin 17. august, 85 ára gomul.
Jarðarferðin verður lýst seinni

*Fyri tey avvarandi*
**John Marnar, Ingmar og Eleina**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálp,
tá mín høgt elskaði maður, verpápi, abbi
og langabbi okkara

**Hjørleif Højsted**
Vági

doyði og varð jarðaður.
Takk til prest, sangarar, berarar og kirkjutænarar.
Takk fyri kransar, blómur og til tykkum, sum sendu
gávu til missiónshúsið í Vági.
At enda takka vit tykkum øllum, sum fylgdu
Hjørleifi, til hansara seinasta hvíldarstað
her á foldum.

*Familjunnar vegna*
**Berghild, Leona og Heri**

### Dagurin

18. august. Agapetus. Deyður umleið ár 300. Ein 15 ára gamal drongur, sum var tikin av døgum fyri kristnu trúgv sína.

*Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Minningarorð um floksfelagar okkara

# Heidi Elisu Joensen og Margrethu Haraldsdóttir Jensen



*Heidi Elisa Joensen*



*Margretha Haraldsdóttir Jensen*

Summarið 2009 kemur at standa eftir í minni okkara, sum nakað vit ongantíð høvdu ímyndað okkum kundi henda. Vit høvdu glett okkum til summarið, at fáa frí frá gerandisdegnum og ikki minst til, at vit skuldu møtast aftur, nú 5 ár vóru liðin, síðan vit fingu húgvuna. Vit høvdu í longri tíð lagt ætlanir um eina veitslu, og gleddu okkum til at síggjast og frætta hvussu gekst og hvat fólk tókust við.

Summarið byrjaði tó við syrgiligu boðunum um, at floksfelagi okkara Heidi var tikin frá okkum, 18. juni, alt ov tíðliga. Hetta var so óveruligt, og torført at skilja, at ein ung genta, við mót uppá lívið og sum tordi at fylgja dreymum sínum, so brádliga var farin.

Og púra óskiljandi var tað aftur 2. aug. tá vit fingu boðini um, at enn einaferð var ein floksfelagi okkara farin. Tungu boðini um at Margretha heldur ikki var ímillum okkum longur, vóru næstan ikki til at bera. Hon var altíð so glað og hevði nógvar ætlanir fyri framtíðina hjá sær og sínum.

Torført er at seta orð á tær kenslur og tankar, ið komu, nú vit tvær ferðir hetta summarið fingu ófrættaboð. Tað kennist ógvuliga skelkandi, at missa tveir floksfelagar so stutt eftir at vit saman gleddust sum pisur. Glað og fróð, spent uppá lívsins avbjóðingar og klár at royna flogið.

Summarið er farið at halla og vit kunnu bara taka minnini við okkum. Allar tær góðu løturnar vit høvdu saman í Hoydølum, námsferðir uttanlands og heima, og veitslurnar vit høvdu saman. Vit sakna tykkum, við tykkara lætta og róliga lyndi. Báðar tvær fyrikomandi og smílandi. Eins og vit, klárar at taka næsta stigið á lívsleiðini.

Spyrjandi sita vit eftir og undrast yvir hvussu henda summarfrítíðin, vit við gleði høvdu sæð fram til, kundi venda soleiðis. Tað tykist so órættvíst, at tit skulu verða tiknar frá okkum øllum so tíðliga. At tit ikki sleppa at útliva tykkara ætlanir og dreymar. Og at tit ikki sleppa at taka næsta stigið á lívsleið tykkara, saman við teimum tit vóru so góðar við og sum vóru so góð við tykkum.

Vit vilja hervið nýta høvið at vísa samkenslu við teimum sum eftir sita, og lýsa frið yvir minnið um Heidi og Margrethu.

**Heilsan**
**01. z í Hoydølum**

# Kirtin (Wolles) Dost fyllir 70 ár

Í dag 18. august fyllir Kirtin Dost, fødd Wolles, 70 ár.

Kirtin er fødd í Klaksvík, men er uppvaksin í Tórshavn. Hon flutti sum heilt ung til Danmarkar at læra seg at seyma. Har møtti hon Jürgen Dost, sum er úr Dresden í táverandi Eysturtýsklandi, sum hon varð gift við í 1964. Sama árið fluttu tey til Suðurtýsklands at búgva, og har búgva tey enn.

Nú hon fyllir 70 ár, kemur hon til Føroyar at halda føðingardagin, sum verður hildin hjá systrini í Kovalág 6 í Havn leygardagin 22. august frá kl. 10 á morgi, har familja og kenningar eru vælkomin.



*Kirtin og Jürgen Dost*